


**Fa. Super Dekk** Tel. 314975 Fax 318172
Hoyvíksvegur 66 - P.O. Box 3012 - 110 Tórshavn superdek@post.olivant.fo

# Sølustevnan SøluRásin 2000

## Skráin:

**Leygardagin 4. november**

Kl. 15.00 SøluRásin 2000 letur upp
Kl. 15.45 Stevnan verður sett av Jógvan Fríðriksson
Kl. 16.00 Ungdómskórið á Strondum syngur
Kl. 18.00 Mótasýning
Kl. 18.30 Barnasjónleikur
Kl. 20.00 Mótasýning
Kl. 21.00 Vísumenn undirhalda
Kl. 21.30 Dráttur millum seld atgongumerkir
Kl. 22.00 Stevnan letur aftur

**Sunnudagin 5. november**

Kl. 15.00 SøluRásin 2000 letur upp
Kl. 15.30 Magni Christiansen syngur
Kl. 16.30 Klovnar undirhalda á pallinum
Kl. 17.00 Mótasýning
Kl. 17.30 Vørutombola í bygdasalinum
Kl. 19.00 Vísumenn syngja
Kl. 20.00 Mótasýning
Kl. 21.00 Jónsvein og Birgir syngja á pallinum
Kl. 21.30 Dráttur millum seld atgongumerkir
Kl. 21.45 SøluRásin 2000 endar

Vælkomin!

# Yvirlit yvir framsýnarar:

1) Esmar Simonsen (bilar)
2) Heiðabúðin (taskur og gávulutir)
3) Tempur (pútur, madrassur o.a.)
4) Curri (ítróttarútgerð)
5) 29, Klædnahandil (klæðir o.a.)
6) TERA (sjónvarp - parabolir - teldur - telduspøl o.a.)
7) Hjá Sannu (barnaklæðir - kosmetik o.a.)
8) Reyni Service (bilar)
9) Tektrade (skips- & bátaútgerð)
10) Orkis (blómur og jólavørur)
11) Deild C (barnaklæðir)
12) Super dekk (dekk o.a.)
13) Jallur (klæðir)
14) SP/F Alvi (smykkur og onnur før. brúksting) (framleiðsla Torgerð Suðuroy)
15) Diana Jacobsen (meturvøra o.a.)
16) Hallo (fartelefonir)
17) SøluRásin 2000
18) Tutl (fløgur)
19) Tubbaksverndarfelagið (upplýsing)
20) Josi (klæðir)
21) Frú S (gávulutir)
22) P/F Højgaards Handilsvirki (amboð)
23) Jungmann (klæðir o.a.)
24) Leikabúðin (leikur)
25) Kaupthing (íløgufelag v.m.)
26) Shop-Inn (klæðir)
27) Skóbúðin v/Elsu (skógvar)
28) Nordbil (bilar)
29) Café

**Støðuplanur yvir básarnar:**





# Bókhaldari/skrivari

Søkt verður eftir bókhaldara/skrivara at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið**
Bókhaldarin/skrivarin, sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran, hevur ábyrgdina av teimum roknskaparligu viðurskiftunum hjá felagnum so sum

- at skipa dagliga arbeiðið í bókhaldinum og tryggja, at bókhaldið støðugt er dagført
- debitorrøkt og gjalding av ognarum
- ársroknskapi

Harumframt skal bókhaldarin/skrivarin vera við til at gera skriviarbeiði og at viðlíkahalda og menna dagligu mannagongdirnar á virkinum.

Fyri rætta persónin er talan um eitt spennandi og avbjóðandi framtíðarstarv.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til bókhald og roknskap
- er vanur at arbeiða við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu
- hevur royndir frá líknandi starvi
- hevur tænastuhug og -hegni

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til Team 85 skjótast til ber og í seinasta lagi 10. november 2000.
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Johnny Gaard, stjóra, á tel 31 65 11 ella e-mail jg@team85.fo.
Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Hoyvíksvegur 59
Postboks 3138
FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 11 • Fax 31 03 90
www.team85.fo

team 85

P/F Team 85 er Føroya størsta reklamuvirki. Umframt alt vanligt reklamu- og layoutarbeiði arbeiðir Team 85 við internetinum, animatiónum og 3D. Harafturat hevur Team 85 egna verkstovu, sum framleiðir skelti, framsýningarbásar o.a. Team 85 miðar eftir alla tíðina at fylgja við í teirri tøkniligu menningini og at vera á odda á sínum øki.

Hjá felagnum starvast í løtuni 10 fólk. Av hesum starvast 5 á kreativu deildini, 3 á verkstovuni og 2 í fyrisitingini.

TK Stovan

# Kunningarfundur um bonusløn

**Mánadagin 6. nov. kl. 13.00-16.30 á Hotel Føroyum**

**Fá meira burturúr lønini:**

TK Stovan skipar fyri kunningarfundi undir heitinum "Bonusløn sum effektiviseringsamboð". Endamálið við tiltakinum er at greiða frá, hvar føroysk virki (privat, hálvalmenn og almenn) eru í dag, tá talan er um nýtslu av ymiskum lønarhættum fyri at fáa betri effektivitetsstýring. Greitt verður frá ymiskum møguleikum og nýggjum lønarskipanum. Fyrilestrahaldararnir fara allir at greiða frá sínum evni sæð bæði í einum tíðarhøpi (fyrr, í dag og í framtíðini) og í einum hierarkiskum høpi (tímalønt fólk, millumleiðarar, deildarleiðarar, fulltrúar og leiðslan á virkinum).

**Skráin verður í høvuðsheitum hendan:**

13.00 TK-Stovan bjóðar vælkomin
13.10 Lýsing av støðini á privatan marknaðinum í Føroyum í dag v/Ólavur Gregersen og Jákup Mørkøre
13.45 Stuttur steðgur
13.55 Lýsing av støðuni á almenna arbeiðsmarknaðinum í Føroyum í dag v/Thomas Magnussen
14.25 Steðgur
14.40 Resultatløn v.m. sum ein av nýggju lønarhættunum í Danmark og sum amboð til øktan effektivitet. Resultatløn verður lýst frá ymsum síðum við dømum. Hvat er farið fram á økinum seinastu árini, og hvat kann væntast í nærmastu framtíð, bæði fyri tímalønt, mánaðarløntu millumliðini og leiðslurnar. v/ Sten Nicolaisen frá lønardeildini hjá Dansk Industri.
16.10 Møguleiki fyri at seta fyrispurningar til allar fyrilestrahaldararnar (ella stutt tjak)
16.30 Endi

**Tilmelding:** TK Stovan, fax 31 93 63, tlf. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo.
**Kostnaður:** kr. 350,00 u/mvg
Tilmelding í seinasta lagi **hósdagin tann 2/11-2000 kl. 12.00.**
Tilmeldingin er bindandi

Virkisnavn:__________ Tal av luttakarum:__________

Navn/Nøvn:__________

Bústaður:__________

Tlf:__________ Fax:__________

**TK-Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK-Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.




LIFTON



**Hydraulikkhamarar til gravmaskinur 72-515 kg**
*Skjótir at seta upp*
*Úrslitagóðir*
*Lættir at veita tænastu til*

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

